## Húsakórið kórkvøld

Føroyska kórið í Keypmannahavn, Húsakórið, gav út fjølbroyttu fløguna Sólarmessa stutt fyri jól, og í annaðkvøld, hóskvøldið, bjóðar kórið til kórkvøld í Føroyahúsinum í Vesterbrogade, har kórið fer at syngja nøkur løg. Tað er Tórur á Brúnni, sum stjórnar kórinum, eftir at Marianne Clausen hevði stjórnað tí í meiri enn 20 ár. Í sambandi við kórkvøldið í annaðkvøld fer Gunnar Nolsøe at hugleiða um Húsakórið sang og kórferðir.

## Pengar til pólgransking

Í mars byrjar Altjóða Pólárið, ið hóast navnið varir tvey ár, og í tí sambandi hevur danska stjórnin gjørt av at játta 60 mió. krónur til granskingar í póløkjunum afturat teimum 16 mió. krónunum, sum stjórnin hevði játtað frammanundan. Herumframt hevur Fólkatingið gjørt av at brúka 400 mió. krónur til ymsar kanningar í og kring Grønland. Helge Sander, ráðharri í gransking, væntar, at Danmark fær nógv burtur úr pólárinum.

# Landsverk steðgaði arbeiðnum í Gøtudali í nakrar dagar

**- Hetta hevði einki við sjálva hæddina á vinnuøkinum at gera, men snúði seg um uttanum viðurskiftini í sambandi við landsvegin, sum vit hava ábyrgdina av, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki**

GØTA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað eru mong, sum koyra oman og niðan gjøgnum Gøtudal, ið hava havt á munni, hví nýggja handilsøkið, sum kommunan hevur planerað til handilslig endamál, liggur so høgt, sum tað ger.

Søgur hava gingið um, at planeraða økið liggur væl hægri, enn ætlanin hevur verið, og tað hevur eisini ljóðað, at ætlanin er at taka nakað oman av hæddini aftur.

Men hetta er ikki rætt.

Økið verður verandi í teirri hædd, tað er í dag og teir, sum hava keypt økið frá Gøtu kommunu, eru nøgdir.

Hetta hevur Sosialurin fingið váttað í samrøðu við Hans Jørgen Djurhuus, sum er ein av monnunum aftanfyri handilsmiðstøðina, ið hevur keypt flestu av teimum tilsamans 13.120 fermetrunum í Gøtudali.



*- Vit vóru ikki nøgdir við, at koyringin til og úr økinum dálkaði landsvegin, og eisini haldi eg, at vit ikki vóru nøgdir við skeltingina í sambandi við planeringsarbeiði, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki*

**Steðgaði arbeiðnum**

Ein orsøk til, at søgur fóru at ganga um eina planeringsgølu, sum onkur hevur rópt hetta, er ivaleyst, at Landsverk einaferð í heyst steðgaði arbeiðnum í Gøtudali í nakrar dagar.

Men Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki, sigur, at henda avgerð hevði einki við sjálva hæddina á økinum at gera.

- Hetta snúði seg meira um ferðsluteknisk uttanum viðurskifti og umstøðurnar uttan um arbeiðsøkið.

Tað hevur nevniliga ljóðað, at Landsverk setti fútaforboð ímóti, at arbeiðið í verandi líki helt fram,



*Nógv halda, at nýggja vinnuøkið í Gøtudali liggur ov høgt at síggja til, men tað hevði einki við hetta at gera, at Landsverk í heyst steðgaði planeringsarbeiðnum í nakrar dagar*

*Mynd: Høgni Thomsen*

men so langt kom tað ongantíð, tí hetta gjørdist ikki neyðugt.

- Nei, vit settu ikki fútaforboð, tí kommunan gekk ynskjunum hjá okkum á møti, so tey viðurskifti, vit høvdu víst á, kundu koma upp á pláss, áðrenn arbeiðið helt fram.

**Bert nakrir dagar**

Oyvindur Brimnes sigur, at Landsverk hevur ábyrgdina av landsveganetinum – og hevur eisini ábyrgdina av øllum íbindingum í landsvegir.

- Tí fáa vit altíð slíkar verkætlanir, sum hesa í Gøtu, ið liggur uppat landsvegi, til góðkenningar. Vit høvdu góðkent verkætlanina, men tá ið arbeiðið var farið í gongd, vóru tað ymisk viðurskifti, vit ikki vóru nøgdir við. Tí ynsktu vit at sleppa at hyggja upp á málið aftur.

Hann sigur, at steðgurin í arbeiðnum í Gøtudali snúði seg bert um nakrar dagar, til Landsverk var nøgt við viðurskiftini.

- Minnist eg rætt, vóru vit ikki nøgdir við, at koyringin til og úr økinum dálkaði landsvegin, og eisini haldi eg, at vit ikki vóru nøgdir við skeltingina í sambandi við planeringsarbeiði.

Oyvindur Brimnes endurtekur, at avgerðin hjá Landsverki soleiðis einki hevði við hæddina á økinum at gera, men honum er eisini komið fyri oyruni, at økið liggur hægri enn upprunaliga ætlað.

**Leysir av málinum**

- Tá ið vit steðgaðu arbeiðnum, var hetta ongan veg komið. Vit bygdu okkara avgerð á, at øll viðurskifti ikki vóru, soleiðis sum vit nú einaferð krevja og høvdu góðkent tey. Vit vilja tryggja okkum, at slík arbeiði ikki órógva landsvegin – og at íbindingin í landsvegin er forsvarlig. Nú er langt síðan, at vit vóru leysir av hesum, sigur stjórin í Landsverki, Oyvindur Brimnes.

# - Vit eru væl nøgdir við handilsøkið

**- Tað er rætt, at økið liggur nakað hægri, enn tekningarnar siga, men hetta er eingin trupulleiki, og vit eru væl nøgdir við økið, sigur Hans Jørgen Djurhuus, sum er ein av monnunum aftanfyri handilsmiðstøðina í Gøtudali**

GØTA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað vóru Poul Arni Jacobsen og Hans Jørgen Djurhuus, sum á sinni skrivaðu undir



*- Eg haldi, at hetta fer at taka seg heilt væl út, tá ið økið verður bygt og omankoyringin er komin, sigur Hans Jørgen Djurhuus*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

avtaluna við Gøtu kommunu um handilsøkið í Gøtudali, og tað eru teir báðir, sum í fyrsta lagi eru stigtakarar til ætlaðu handilsmiðstøðina, sum skal byggjast á planeraða økinum, sum vit síggja á myndini omanfyri.

Hans Jørgen sigur, at teir sambært avtaluni við Gøtu kommunu hava keypt tann partin av økinum, har handilsmiðstøðin skal byggjast.

- Planeraða handilsøkið er tilsamans 13.120 fermetrar, harav Alu-Plast hevur teir umleið 3.000.

Hann sigur, at teir eru vitandi um, at planeraða økið liggur nakað hægri, enn tekningarnar vístu, men sum heild eru teir væl nøgdir við økið, soleiðis sum tað nú liggur.

- Nei, hetta er eingin trupulleiki fyri okkum, og vit arbeiða miðvíst við at fremja okkara ætlan í verki.

Hans Jørgen væntar, at handilsmiðstøðin fer inn á økið um einar tríggjar mánaðir ella so.

- Tað eru nógv viðurskifti, sum skulu fáast upp á pláss, men vit miðja eftir at seta "spakan" í seinni í vár.

Sum skilst, fer Alu-Plast, sum eisini skal byggja á nýggja handilsøkinum, í gongd heilt skjótt.

Hans Jørgen sigur, at tað er í samráð við keypararnar av økinum, at Gøtu kommuna hevur gjørt av at leggja handilsøkið nakað hægri.

- Hetta hevur samstundis gjørt, at kommunan hevur spart nakrar miljónir, sum tað annars hevði kostað meira, um økið lá lægri, sigur hann.

Spurdur, um teir eru nøgdir við prísin, teir hava keypt lendið fyri, heldur hann fyri, at hesin er á góðari leið.

- Eg haldi, at hetta fer at taka seg heilt væl út, tá ið økið verður bygt og omankoyringin er komin, sigur Hans Jørgen Djurhuus.

Sum skilst, hevur tað kostað Gøtu kommunu einar 8-9 miljónir krónur at planera nýggja handilsøkið í Gøtudali.